# Hepni 1.a



1. a í Venjingarskúlanum fyrsta skúladag saman við lærarunum Jørgin við Úlvsá og Fríðu Eysturoy

**1. a á Venjingarskúlanum er ein serligur flokkur. Tvey í flokkinum eru tunghoyrd. Tískil fáa øll í flokkinum undirvísing í teknmáli**

SKÚLIN
*Turið Kjølbro*
*Heri á Rógvi*

Fyrsti skúladagur er ein dagur, øll minnast. Ein serligur dagur, skúlin og foreldur gera nakað serstakt burturúr. Mánadagin fóru 699 børn í skúla á fyrsta sinni í Føroyum. Á Venjingarskúlanum í Havn var ikki sørt gjørt burtur úr hesum degnum, ikki minst tí tveir tunghoyrdir næmingar, Bjørt Hvidbro og Ari Johannesen, á fyrsta sinni komu í skúla. Niels Nattestad, skúlastjóri, greiddi á samkomu frá, hvat tað inniber fyri skúlan og flokkin at hava tveir tunghoyrdar næmingar. Serliga legði hann dent á, at skúlin er fegin um møguleikan at geva hesum næmingunum skúlagongd.

Afturat sær hava Bjørt og Ari deyvalærara, sum skal hjálpa teimum at fylgja við í tí sum fer fram í skúlanum. Tveir deyvalærarar, sum koma av Sernámsdeplinum, vera knýttir at flokkinum.

- Sjálvsagt stúra vit sum foreldur eitt sindur fyri, hvussu tað fer at ganga, men eg rokni við at tað fer at ganga væl. Bjørt hoyrir illa, men klárar at tosa og munnlesa, sigur Jórun Hvidbro, mamma Bjørt.

- Vit eru meiri spent enn stúrin fyri, hvussu skúlgongdin hjá honum verður. Sjálvur er Ari spentur, so tað er sum hjá øllum øðrum børnum, sum fara í skúla fyrstu ferð, sigur Mirjam Johannesen, mamma Ara.

Hinir næmingarnir í flokkinum og foreldur teirra eru fyrireikað uppá, at tveir næmingar, ið eru tunghoyrdir og tískil hava ein serligan tørv, eru í flokkinum. Fyri at allir næmingarnir og lærarar skulu kunna samskifta sínámillum fáa báðir fyrstu flokkarnir og lærarar teirra frálæru í teknmáli ein tíma um vikuna.

- Hesir næmingarnir fáa tískil meiri enn vanliga undirvísing, sigur Jørgin við Úlvsá, lærari hjá 1. a. Hann leggur afturat, at tað er avgjørt ein avbjóðing sum lærari at hava tunghoyrdar næmingar í flokkinum.

- Tað setur stór krøv til læraran. Sum lærari skal eg hugsa um allar næmingarnar, teir tunghoyrdu og heildina. Skúlin sýnir stóran vælvilja at integrera næmingar. So er bara at vóna, at Sernámsdepilin setur neyðugu orkuna inn soleiðis at næmingarnir fáa tað teimum tørvar. Fáa teir tað skuldu vit onnur sum frálíður betur verið før fyri at samskifta við tunghoyrd, sigur Jørgin við Úlvsá.

Henda fyrsta skúladagin møtti 1. a í stóra skúlanum, sum skúlastjórin kallaði hann. Eftir samkomuna fóru næmingarnir oman í gulaskúla, har 1.a skal halda til hesi fyrstu tvey árini av teirra skúlagongd. Á borðinum stóðu navnaskelti, so hvør næmingur visti, hvar hann ella hon skuldi sita. Í dag skuldu tey svimja fyrstu tímarnar.




Bjørt og Ari fremst í myndini

# www.bil.fo

**Endamálið við nýggju heimasíðuni er at privatpersónar og bilasølur kunnu seta sín bil til sølu á ein so léttan hátt sum til ber**

BILASØLA
*Turið Kjølbro*

Mánadagin læt nýggja heimasíðan www.bil.fo upp. Høvuðsendamálið við heimasíðuni er at gera eitt stað á alnótini, har privatpersónar og bilasølur kunnu seta sín bil til sølu á ein so léttan hátt sum gjørligt. Sum støðan er í løtuni, er tann privati brúkarin noydur at ferðast runt á nógvum ymiskum heimasíðum hjá teimum ymisku bilasølunum, um hesin skal finna sær ein bil. Við BIL.FO er ætlanin at savna so nógvar bilar sum møguligt á einari síðu.

BIL.FO er ikki heft at nakrari ávísari bilsølu. Møguleikarnir, sum vera á BIL.FO, eru eitt nú, at privatpersónar kunnu leita eftir bilum eftir ymiskum treytum, at fólk kunnu skjótt og lætt seta sín bil til sølu, at bilasølur kunnu skjótt og lætt seta bilar til sølu - við eini serligari skipan, sum BIL.FO hevur gjørt til bilasølurnar.

- Enn er heimasíðan so nýggj, men vit hava longu fingið fleiri afturmeldingar, eitt nú frá eini bilasølu sum hevur meldað seg til. Tað er ógvuliga positivt, sigur Bárður Bærentsen, ein av stigtakarunum til heimasíðuna.

Seinni er ætlanin at heimasíðan eisini skal fevna um sølu av lastbilum, kranabilum og skutarum. Kjaksíða er eisini á heimasíðuna, har tú kanst skriva tína meining um mangt og hvat.




Nýggja heimasíðan, har til ber at keypa ein bil ógvuliga einfalt. Stigtakarar eru Bárður Bærentsen, Hildigunn Olsen og Petur Kirke



# Eldsbruni í Vágatunnilinum



*Mánakvødlið vórðu sløkkiliðini í Vágum boðsend, tí eldur var í einum spennisbroytli í Vágatunlinum*

**Mánakvøldið noyddust arbeiðsfólk at rýma úr undirsjóvartunlinum Vágamegin, tí eldur var í einum spennisbroytli 800 metrar inni. Eldurin varð tó skjótt sløktur og fólk vóru aldri veruliga í vanda**

ELDSBRUNI
*John Johannessen*

Bæði sløkkiliðið í Sørvági og sløkkiliðið í Miðvági vórðu boðsend, tá arbeiðsfólk Vágamegin í undirsjóvartunlinum varnaðust, at eldur var komin í ein spennisbroytil (transformator) 800 metrar inni í tunlinum.

Tá eldurin kyknaði arbeiddu fólk heilt inni á botni í tunlinum Vágamegin og vóru sostatt innan fyri eldin. Men kortini var aldri nakar serligur vandi fyri, at fólk komu til skaða.

Mennirnir, sum arbeiddu heilt inni á botni í tunlinum, sluppu sær beinan vegin út úr tunlinum við bili, tá teir varnaðust nógva roykin.

## Køvdu eldin

Felagið NCC, sum hevur átikið sær uppgávuna at gera Vágatunnilin, hevur heilt neyvar fyriskriftir, hvussu berast skal at, um eldur kyknar í tunlinum. Teir sløktu beinan vegin súrevnisveitingina inn í tunnilin, so eldurin ikki fekk nørt seg, og ringdu beinan vegin eftir sløkkiliðunum fyri at tryggja sær, at eldurin bleiv sløktur.

Sløkkiliðini úr Sørvági og Miðvági komu beinan vegin til tunnilin, men tá tey komu innar, var eldurin longu køvdur. Tó var framvegis nógvur roykur inni í tunlinum. Og tískil varð útluftingarskipanin sett í gongd aftur, tá sløkkiliðini høvdu tryggja sær, at eldurin ikki fór at kykna aftur.

## Neyðútgerð er í tunlinum

Sambært Svein Kristiansen, arbeiðsformanni hjá NCC, høvdu arbeiðsfólkini inni í tunlinum mánakvøldið verið rímiliga trygg, sjálvt um tey ikki sluppu út meðan eldur var í.

– Vit hava sokallaðar bjargingarbyngjur standandi inni í tunlinum, har arbeiðsfólkini kunnu fara, um eldur er í ella okkurt annað er áfatt. Í bingjunum eru millum annað súrevnisfløskur og útgerð til fyrstuhjálp, greiðir hann frá.

Spennisbroytilin var um hálvan metur høgur og 60 centimetrar breiður, og stóð ikki næhendis øðrum tólum ella ørðum eldfimum tilfari. Tí vóru menn alla tíðina greiðir yvir, at vandi ikki var fyri nøkrum stórum eldi. Men nógvi roykur vandamikil roykur stóðst tó av eldinum, orsakað av, at tað var isolatiónin í spennisbroytilinum, ið brendi.

## Seinkaði arbeiðinum

Eldsbrunin mánakvøldið seinkaði arbeiðinum í tunlinum umleið eitt hálvt døgn. Spennisbroytilin oyðilegðist av eldinum, og tí fór streymurin inni í tunlinum.

Men NCC hevði ein annan spennisbroytil standandi kláran Leynamegin. Hesin varð fluttur vestur um sundið týsmorgunin og settur til, so arbeiðið kundi byrja aftur.

# Høgni biðjur Norðurlond um samstarv

**Á árligum fundi millum norðurlendsku løgmálaráðharrarnar í farnu viku heitti Høgni Hoydal á ráðharrarnar um samstarv, nú føroyingar skulu yvirtaka lógarmál og byggja upp egnar myndugleikar**

YVIRTØKA
*John Johannessen*

Høgni Hoydal vil hava samstarv við hini Norðurlondini innan lógarmál, nú føroyingar skulu yvirtaka málsøkið.

Á árligum fundi í Mariehamn á Álandi millum norðurlendsku løgmálaráðharrarnar heitti Høgni Hoydal á løgmálaráðharrarnar um samstarv, nú føroyingar eru í ferð við at byggja upp egnar myndugleikar í løgmálum.

Samstundis kunnaði Høgni Hoydal um fullveldistilgongdina og greiddi frá arbeiðinum við føroyskari grundlóg, rættarskipan og løgreglu.

## Samskipa lóggávu

Norðurlendsku løgmálaráðharrarnir samdust á fundinum um at kanna og samskipa lóggávuna í persóns-, familju- og arvarætti.

Hetta heldur Høgni Hoydal vera eitt mál, sum hevur stóran týdning fyri Føroyar, nú ætlanin er, at persóns-, familju- og arvarættur skulu koma undir føroyskt ræði frá 1. januar 2002.

Eitt annað mál, sum føroyski landsstýrismaðurin í lógarmálum heldur hava stóran týdning fyri Føroyar er, at Norðurlond í felag gera eitt fullfíggjað yvirlit yvir rættindini hjá norðurlendingum í londunum hjá hvørjum øðrum. Rættindini, hugsað verður um, eru rættindini til arbeiði, sjúkraviðgerð, útbúgving, almannahjálp og pensjón, ið galda fyri allar norðurlendingar, uttan mun til, hvørjum Norðurlandi, teir uppihalda sær í.

## Samstarvsfundur

Fundurin í Mariehamn í farnu viku var partur av einum føstum samstarvi millum løgmálaráðharrarnar í Norðurlondum. Ráðharrarnir hittast einaferð um árið í einum av Norðurlondunum og skifta orð um samstarvsmøguleikar innan málsøkið.

Í ár røddu løgmálaráðharrarnir millum annað um samstarv at fyribyrgja barna- og ungdómskriminaliteti, at revsa og fyribyrgja handli við kvinnum, sum skipað brotsmannalið standa fyri og at fyribyrgja og revsa rasismu og nýnasismu.

Fundarluttakararnir í ár vóru Frank Jensen úr Danmark, Thomas Bodström úr Svøríki, Johannes Koskinen úr Finnlandi, Solveig Pétursdóttir úr Íslandi, Hanne Harlem úr Noreg, Sune Eriksson úr Álandi og Høgni Hoydal úr Føroyum. Næsti fundurin millum norðurlendsku løgmálaráðharrarnar verður í Noreg næsta ár.

# Oljumálastýrið átalar oljufelag

**Eyðun Elltør, landsstýrismaður við oljumálum, fer í næstum at senda oljufelagnum WEBA Oil & Gas skriv, har hann átalar, at oljufelagið tekur lut í herðferðini móti grindadrápi**



GRINDADRÁP
*John Johannessen*

Eitt oljufelag, ið er við til at leita eftir olju í føroyskum øki, sleppur ikki at taka lut í herðferðini móti grindadrápi.

Hetta er landsstýrið púra samt um. Og tí gjørdi landsstýrið eisini á fundi týsmorgunin av, at landsstýrismaðurin í oljumálum skal gera greitt fyri oljufelagnum WEBA Oil & Gass, at tað ikki sleppur at stuðla Paul Watson, so leingi tað leitar eftir olju í Føroyum.

Tað var Jørgen Niclassen, landsstýrismaður við ábyrgd fyri grindadrápi, sum reisti málið um ojufelagið og grindadráp á landsstýrisfundi, eftir at Fregnir fríggjadagin avdúkaðu, at oljufelagið hevur bundið seg til at vera við í herðferðini móti grindadrápi.

– Tað stendur heilt greitt í leitiloyvunum, at oljufeløgini ikki skulu leggja seg út í føroysku mentanina. Og eg haldi ikki, at vit skulu lata tað fara aftur við borðinum, at eitt oljufelag samstarvar móti føroyingum við Paul Watson, sum er burturvístur úr Føroyum sum brotsmaður, sigur Jørgen Niclassen.